Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Kim Durhuus, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: At gagnnýta alt okkara tilfeingi

Spurningar:

1. Hevur landssstýrismaðurin nakrar ítøkiligar ætlanir um at lóggeva alt okkara tilfeingi til lands?
2. Hevur landsstýrismaðurin verið í samskifti við vinnuna um málið?
3. Hvørjir stuðulsmøguleikar hevur landsstýrismaðurin at stuðla nýskapandi ætlanum innan økið?

Viðmerkingar:

Fiskivinnan er okkara høvuðsvinna, og tað er umráðandi, at vit sum samfelag fáa mest møguligt avkast frá vinnuni. At virðisøkja okkara rávørur kann verða ein týðandi liður í at skapa fleiri størv í framtíðini og eisini birta undir hugin hjá ungum fólki at fáast við fiskivinnu í breiðastu merking – tað kann vera bæði í ídnaði, framleiðslu, gransking, sølu og so framvegis.

Í nógv ár hevur verið tosað um, at vit eiga at fáa alt okkara tilfeingi til lands, soleiðis at vit kunnu útvinna sum mest burtur úr øllum tí, vit taka úr havinum.

Um Føroyar sum samfelag skulu fáa sum mest burtur úr okkara tilfeingi, er avgerandi, at hendan uppgávan verður tikin í álvara. Samstarv millum almennu Føroyar og vinnuna er ein loysn, sum avgjørt eigur at verða roynd.

Útflutningsvirðið kann økjast nógv, um rætt verður atborið. So gott sum alt, sum kemur úr havinum, kann gagnnýtast og útflytast.

Á Løgtingi, 4. december 2023

Kim Durhuus